# FUNDARBÓK HJÁ
# VÁGS BÝRÁÐ 2014

| | | |
|---|---|---|
| **Fundur nr. 6**<br>**Tíð:** 23. juni 2014, kl. 19.00<br>**Stað:** Kommunuskrivstovan | **Skrivari:** Petry Joensen | |
| **Fastir fundardagar:**<br>28. januar, 17. februar, 17. mars,<br>28. apríl, 26. mai, 23. juni,<br>25. august, 29. september,<br>27. oktober, 24. november,<br>15. desember | **Møttir:**<br>Allir Býráðslimir,<br>Eyðbritt Krosslá møtti fyri Danjal Bjarkhamar | **Ikki á fundi:**<br>Dánjal Bjarkhamar, fráboðað |

Dánjal Bjarkhamar hevur boða frá at hann er burturstaddur, og kann tí ikki luttaka á býráðsfundinum 23. juni, men ynskir at fyrst valda eykaumboð á lista Tjóðveldis, Eyðbritt Krosslá, møtir á fundinum fyri hann.

Einmælt samtykt.

Borgarstjórin biður um at fáa eitt mál aftrar við á skránna sum mál nr. 10 j.nr. 14/00123 Umsókn um byggiloyvi at flyta dagtangahúsið á Vágsverkinum frá Elfelagnum SEV.

Einmælt samtykt, at taka hetta mál við á skránna.

**1) Mál nr.: 13/00202** Umsókn um byggiloyvið uppí sethús

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram til viðgerðar umsókn um byggiloyvið uppí sethús á matr. nr. 493ab. Tekniska umsitingin vísir á, at umsøkjarin hevur latið teimum nýggjar tekningar og grannarnir Rini Mørk/Tórður Holm og Niels við Gjógvará hava góðkent hetta. Tekniska nevnd hevur á fundi 11. juni samtykt at mæla býráðnum til at játta byggingina.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við byggiloyvinum treyta av, at Rini Mørk undirskrivar notatið sum gjørt er út frá samrøðu við Tórður Holm (grannaloyvið).

**2) Mál nr.: 13/00234** Upptøkureglur fyri barnaansingina

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram uppskot til nýggjar upptøkureglur fyri barnaansingina. Mentunarnevndin hevur á fundi 19. mai samtykt, at taka undir við fyriliggjandi uppskotið og at seta hetta í verk frá 1. januar 2015.
Somuleiðis samtykt at taka upp gjaldið í samband við FÆ2015.

Undirskriva:

Mentamálaráðið skal somuleiðis góðkenna upptøkureglurnar.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**3) Mál nr.: 14/00030** Leigusáttmáli millum Vágs kommunu og Elfelagið SEV

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram uppskot til nýggjan leigusáttmála millum Vágs kommunu og Elfelagið SEV.
Gamli sáttmálin gekk út 1. apríl 2014 og hevur Vágs kommuna heitt á SEV um at fáa sáttmálan endurskoðan tí Vágs kommuna sjálv ynskti at nýta størri part av bygninginum eftir 1. apríl 2014.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at leingja leigusáttmálan til 1. desember 2014 við nýggjum treytum (nýggjum uppskotið til leigusáttmála).

**4) Mál nr.: 14/00034** Samstarvsavtala um Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram Samstarvsavtalu um Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy, sum er send øllum kommunustýrinum í Oynni at taka støðu til við telduposti dagfestur 19. juni 2014.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við uppskotið til samstarvsavtalu um Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy.
Vágs kommuna mælir til at umsitingin verður staðsett í Vági og at avgerðarrætturin (grein 5 stk. 6) skal avgreiðast við minst 2/3 av fólkatalinum í kommununum, í øðrum lagið kann Vágs kommuna taka undir við uppskotið hjá Almannamálaráðnum.

Vágs kommuna mælir til at Suðuroyar Ellis- og Røktarheim verður yvirtikið av Bú- og Heimatænastuni í Suðuroy. Og at greiður skilnaður er millum raksturin av Suðuroyar Sjúkrahúsið og Ellis- og Røktarheiminum.

**5) Mál nr.: 14/00096** Umsókn um sundurbýtið av matr. nr. 380a

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram umsókn um sundurbýtið av matr. nr. 380a. Tekniska nevnd hevur á fundi 11. juni samtykt at mæla býráðnum til at játta umsóknini.

Undirskriva:

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**6) Mál nr.: 14/00109** Sáttmálin um Suðuroyar Barnaverndartænastu

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá Sosialu nevnd sum heita á býráðið um, at biðja um at fáa samstarvsavtaluni fyri Suðuroyar Barnaverndartænastu endurskoðaða vísandi til § 7 stk. 2.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**7) Mál nr.: 14/00116** Stuðul til Vágs Sóknar Bygdasavn

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá Mentunarnevndini og Fíggjarnevndini, sum á fundum 19. mai og 16. juni hava samtykti at stuðla Vágs Sóknar Bygdasavn og Vágs Forminnisfelag við 72.000,00 kr. fyri árið 2014.

**Avgerð:**
Eydis Kjærbo leiddi fundin í hesum málið, Dennis metti seg ógegnigan.
Einmælt samtykt at játta stuðulin á 72.000,00 kr..

Vágs Býráð ynskir at heita á nevndina um at skipa støðugar framsýningar sum eri atkomuligar fyri borgarar. Og at mæla til at húsið er meira opið í summarhálvuni og um jóltíðir, tá nógv ferðafólk og útsettar vitja í Vági.

**8) Mál nr.: 14/00118** Umsókn viðv. Stóra Pakkhús til ummælis

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram til staðfestingar, umsókn um endurnýggjan av matstovuloyvi, alment loyvi og skeinkiloyvið til Stóra Pakkhús sent Vágs kommunu til ummælis við telduposti 12. maj 2014.
Grunda á at hetta skuldi avgreiðast áðrenn býráðsfundin, hava býráðslimir svara hesum umvegis teldupost og hava allir (8) givið játtandi svar.
Borgarstjórin Dennis Holm hevur ikki svarað, grunda á at hann metti seg ógegnigan.

**Avgerð:**
Kunnað og samtyktin staðfest.

Undirskriva:

**9) Mál nr.: 14/00122** Framhaldandi skipan við ungdómshúsið og for- og frítíðarskúla

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram uppskot frá leiðaranum fyri ungdómshúsið og leiðaranum fyri Eikilund hvussu tilboðini (ungdómstilboð, barnaansing og frítíðarskúli) kunnu skipast eftir summarsteðgin við at hava alt undir einari leiðslu. Vitjað verður í Ungdómshúsinum áðrenn býráðsfundin hvar ætlanin verður løgd fram.

**Avgerð:**
Eitt samt býráð er av teirri áskoðan at hetta tilboð skal halda áfram.
Neyv skipan og fígging verður løgd fyri býráðið beint eftir summarsteðgin.
Býráðið er samt um, at kommuna eigur at arbeiða fram ímóti at ogna sær bygningin.

**10) Mál nr.: 14/00123** Byggiloyvi til flytan av dagtangahúsið hjá SEV

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram til kunningar játtan frá Havnanevndini at loyva Elfelagnum SEV at flyta dagtangahúsið fyribils.

**Avgerð:**
Kunnað, býráðið tekur undir við Havnanevndini.